## Al-Jazeera: Skjal prógvar amerikanska samansvørjing

Í vikuni hevur al-Jazeera kunngjørt tíðindini um, at tíðindarásin hevur fingið hendur á eitt, sambært rásini, avdúkandi skjal. Skjalið skal prógva, at amerikanskir myndugleikar hava lagt ætlanir um at skifta fólkavaldu Hamas út við Fatah-rørsluna. Skjølini eru tó ikki skjalmerkt við stempli ella líknandi, leggur tíðindarásin afturat síðst í tíðindaskrivinum.



# ska heiminum



*Ein ung Benazir Bhutto úr 80unum við byrjanini á politisku yrkisleið síni.*

ósigur. Men nøkur ár eftir var hennara fólk farið í tvíningar, og hon var sostatt deyðadømd. Í 687 herjaði arabiski herførarin á aftur. Søgan sigur, at hon fekk sítt banahøgg uppi í Auresfjøllunum. Sambært søgnini gjørdist hon 127 ár, harav var hon drotning í 35 ár. Søgubøkurna úr arabisku miðøldini siga frá, hvussu hendan eldri einkjan kundi spáa um framtíðina. Hesar gávur hava óiva virkað til styrkja hennara vald.

Eins og Bhutto doyði al-Kahina sum ein politisku leiðari í stríði. Bhutto helst av einum politiskum bumbubresti og al-Kahina hevði einki at gera annað enn at stríðast til fánýtis ímóti einum arabiskum herliðið, sum í roynd og veru ikki steðgaði sínari innrás 40 ár seinni á franskari jørð, fyri Charles Martel. Men hesar kvinnur livdu tó ikki í dagligum sambandi við truplu umstøðurnar, sum vanliga kvinnan livdi og, enn í dag, livir undir.

### Lesiførleiki og javnstøða í dag

Í 1980unum áttu kvinnur úr Norðurafrika og Miðeystri seks børn í miðal. Síðan er miðaltalið farið skjótt niður eftir, og er nú komið niður á trý til fýra børn í miðal. Hetta er tann knappasta minkingin í heiminum, sambært UNICEF. Hendan positiva tilgongdin verður sett í samband við betraða skúlaskapin, herundir vaksandi lesiførleika og upplýsing.

Hagtøl, ið siga frá fleiri barnsburðum í einum samfelag, bera ofta boð um lesiførleikan og útbúgving hjá kvinnum og síðan aftur møguleikarnar hjá kvinnum at koma út á arbeiðsmarknaðin, á jøvnum føti við mannfólk, og at fáa ávirkan á sítt samfelag – og harvið røra vit við spurningin um javnstøðu.

Hendan omanfyrinevnda trupla støðan fevnir um tað staðfesting, at vaksnar kvinnur við lesiførleika í øllum teimum arabisku londunum, undantikið Sameindu Emiratunum, eru færri enn teirra landsmenn.

Fylgjurnar av hesi støðu eru álvarsligar avbjóðingar fyri alt samfelagið: eitt samfelag við einum stórum hópi av væl útbúnum arbeiðsleysum ungum.



*Fakta: Iran eigur helst heimsins størsta fall í barnsburðatali – frá 8,1 í 1976 til 2,4 í 2000*

Og tá ið politiska trýstið er stórt, og demokratiskar leiðreglur ikki verða fylgdar, t.d. við harðrendum einaræði, eru umstøðurnar jú vánaligar til at betra um støðuna viðvíkjandi javnstøðu. Í Føroyum er hinvegin talan fyri ein stóran part – og væl møguliga størsta partin – um politiska raðfesting, tí vit hava nevniliga umstøður at taka fleiri stig á hesi leiðini.

Hetta er so partur av tí trupulleika, sum kvinnur í muslimskum londum standa fyri, nevniliga tað, at umstøðurnar eru sera torførar um málið javnstøða skal røkkast. Kring størsta partin av muslimska heiminum eru kvinnur fyri mismuni í statsligu lógarverkunum, t.d. er tað torførari hjá kvinnum at skiljast frá ektamanninum, pápin fær oftari rættin yvir barninum og eisini viðvíkjandi spurningum um arv.

Hóast støðan síðan 80ini er nógv broytt og trýst verður lagt á ymisku stjórnirnar at broyta lógarverkini, soleiðis at kvinnur í størri mun verða settar javnt við mannfólk, so er langt eftir á mál – luttøkan hjá kvinnum úr Norðurafrika og Miðeystri á teirra arbeiðsmarknaði er í dag tann lægsta í øllum heiminum.

Trupla støðan í fleiri av muslimsku londunum botnar í politiskum trupulleikum. Politisku raðfestingarnar eru ikki gjørdar í hesum samfeløgunum, hetta av ymiskum orsøkum. Ein er uttan iva tann, at øll tey arabisku londini inntil nýliga hava verið bóndasamfeløg, og slík samfeløg seta ongantíð kvinnuna javnt við mannin, um so samfelagið er muslimskt ella ei. Í arabiska heiminum hava politisku leiðararnir orsøka av fíggjarligari neyðstøðu verið noyddir at fáa tamarhald við teimum mongu barnsburðunum. Tí eru politisk átøk gjørd fyri at bøta um – hetta sær mann serliga væl í politisku átøkunum í Iran, sum helst eigur heimsins størstu minking í barnsburðum. Føroyar skal í hesum mánaðinum lata inn frágreiðing til ST um tey átøk, sum eru gjørd til frama fyri javnstøðu. Tað er greitt, at hjá okkum føroyingum er tað meiri ein spurningur um raðfesting, enn truplar umstøður, sum forða okkum í at taka stigini á leiðini ímóti javnstøðu millum kynini.